Dátueftirlitið

# Ársfrágreiðing
# 2022

**ÁBYRGD:** Dátueftirlitið
**SNIÐGEVING:** Kodio

# INNIHALDSYVIRLIT


1. FORORÐ 4

2. DÁTUEFTIRLITIÐ 5

- 2.1 Bygnaður 5
- 2.2 Játtan á løgtingsfíggjarlógini 5
- 2.3 Lógargrundarlagið 6
- 2.4 Uppgávur 6
- 2.5 Heimildir 6

3. VIRKSEMI Í 2022 7

- 3.1 Eftirlit 7
- 3.2 Trygdarbrot 8
- 3.3 Ráðgeving og vegleiðing 9
- 3.4 Hoyringar 9
- 3.5 Fráboðanir um vakmyndatól 9

4. YMISK HAGTØL FYRI 2022 11

5. ÚTVALD MÁL Í 2021 14

- 5.1 Almennur stovnur fingið álvarsliga átalu 14
- 5.2 Óviðkomandi fingið atgongd til viðkvæmar upplýsingar 14
- 5.3 Fyritøka meldað til løgregluna fyri brot á dátuverndarlógina 14
- 5.4 Almennur stovnur álvarsliga átalu fyri væntandi trygd 15
- 5.5 Viðkvæmar persónupplýsingar lagdar út á Facebook 15
- 5.6 Kommuna fingið átalu og kravboð 15
- 5.7 Dátuverndarkunning eigur at vera á føroyskum 16
- 5.8 Dátuviðgerðar kunnu ikki vera dátuverndarfólk – nágreining 16

6. ALTJÓÐA SAMSTARV 17

- 6.1 Triðjalandsgóðkenning frá ES-nevndini 17
- 6.2 Triðjalandsgóðkenning av Suðurkorea 17
- 6.3 Norðurlenskur fundur í Helsinki 17

# 1. FORORÐ

Við hesum letur Dátueftirlitið ársfrágreiðingina fyri 2022 úr hondum.

Ársfrágreiðingin verður skrivað sbrt. § 68, nr. 7 í dátuverndar-lógini og er ætlað almenninginum.

Í ársfrágreiðingini er virksemið hjá Dátueftirlitinum í 2022 lýst í hagtølum. Eisini er yvirskipað greitt frá málum, sum serliga hava fylt í arbeiðinum hjá Dátueftirlitinum í undanfarna ári.

**Saltangará, 18. desember 2023**

**Helga á Borg**
*Formaður í Dáturáðnum*

**Tóri Højgaard**
*Stjóri í Dátueftirlitinum*

# 2. DÁTUEFTIRLITIÐ

**DÁTUEFTIRLITIÐ ER EIN ÓHEFTUR FYRISITINGARLIGUR MYNDUGLEIKI, HVØRS AVGERÐIR ERU ENDALIGAR INNAN FYRISITINGINA. DÁTUEFTIRLITIÐ ER STOVNUR UNDIR LØGMANSSKRIV-STOVUNI, MEN ER Í VIRKSEMI SÍNUM ÓHEFT.**

Dátueftirlitið umsitur løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin). Dátueftirlitið skal í sínum arbeiði hava eftirlit við allari viðgerð av persónupplýsingum, sum dátuverndarlógin fevnir um.

Dátueftirlitið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum.

Dátueftirlitið hevur virkað síðani 1. januar 2002, tá ið persónupplýsingarlógin, sbrt. løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónupplýsingum, kom í gildi.

Umframt at umsita dátuverndarlógina, umsitur Dátueftirlitið eisini – saman við Løgmansskrivstovuni og politinum – løgtingslóg nr. 178 frá 17. desember 2020 um yvirvøku við vakmyndatóli, undir hesum serliga fráboðanarskylduna.

## 2.1 Bygnaður

Dátueftirlitið er skipað við Dáturáði, sum verður valt av landsstýrismanninum í lógarmálum, og avgreiðslu-skrivstovu, sum er undir leiðslu av einum stjóra. Limirnir í Dáturáðnum eru persónliga valdir, og formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri fýra ár í senn, og somuleiðis verða varalimir valdir fyri fýra ár.

Sitandi Dáturáð varð tilnevnt 1. juli 2020 í sambandi við, at dátuverndarlógin bleiv samtykt í juni 2020. Við nýggju løgtingslógini bleiv ráðið víðkað við tveimum limum og telur nú fimm limir.

### Limirnir í Dáturáðnum frá 1. juli 2020

Helga á Borg, advokatur, formaður
*Varalimur: Janus Hentze í Stórustovu, løgfrøðingur*
Maria Skaalum Petersen
*Varalimur: Marin Strøm*
Brian Bischoff
*Varalimur: Nicolai Mohr Balle*
Jóhan Lamhauge,
tilnevndur eftir tilmæli frá Kommunufelagnum
*Varalimur: Beinta P. Olsen*
Birita Biskopstø,
tilnevnd eftir tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
*Varalimur: Marius Thomassen*

Jóhan Lamhauge tók seg úr Dáturáðnum 1. juni 2021. Í hansara stað er komin Janus Haraldsen, sum er tilnevndur eftir tilmæli frá Kommunufelagnum.

Birita Biskupstø tók seg úr Dáturáðnum 1. des. 2022 Í hennara stað er komin Bára Gunnarsdóttir, sum er tilnevnd eftir tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

### Skrivstovan

Dátueftirlitið hevur síðani 1. november í 2021 hildið til í Sigmundargøtu 13 í Tórshavn. Tann 18. aug. 2022 boðaði táverandi løgmaður, Bárður Nielsen, frá, at avgerð var tikin um, at Dátueftirlitið skuldi flyta inn á eystara arm á Skálafjørðinum. Síðani hevur verið arbeitt við at fyrireika flytingina. Dátueftirlitið flutti í nýggj hølir á Heiðavegi 25 í Saltangará síðst í november 2023.

Við árslok 2022 starvaðust ein stjóri, tveir fulltrúar og ein skrivari á Dátueftirlitinum. Samlaða starvsfólkaorkan hjá stovninum er ásett at vera seks starvsfólk, og tískil vóru tvey størv tøk við ársenda. Tað eina av hesum varð mannað í mars í 2023, men av tí, at óvist var júst nær stovnurin fór at flyta, valdi man at bíða við at seta tað seinna starvið til ein endalig ætlan fyri flytingina fyriliggur.

## 2.2 Játtan á løgtingsfíggjarlógini

Samlaða játtanin hjá Dátueftirlitinum í 2022 var 4,1 mió. kr. Niðanfyri er ein útgreining av fíggjarjáttanini og roknskapinum, hjá Dátueftirlitinum fyri 2019 – 2022.

**Fíggjarjáttan og roknskapur hjá Dátueftirlitinum fyri 2019 - 2022** Sundurgreinað ætlan

| Tús. kr | 2019 J | 2020 J | 2021 J | 2022 J |
|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | 2.445 | 3.252 | 3.713 | 4.103 |
| Lønir o. a. | 2.085 | 2.742 | 3.323 | 3.563 |
| Keyp av vørum og tænastum | 280 | 430 | 495 | 435 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 80 | 80 | 80 | 80 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovnar | | | 25 | 25 |

## 2.3 Lógargrundarlagið

Ymsar reglur, ið løgskipa virksemið hjá Dátueftirlitinum:

- Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum
- Kunngerð nr. 175 frá 16. desember 2020 um triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðvíkjandi flutningi av persónupplýsingum, sum broytt við kunngerð nr. 62 frá 4. mai 2022
- Løgtingslóg nr. 178 frá 17. desember 2020 um yvirvøku við vakmyndatóli
- Starvsskipan fyri Dáturáðið við gildi frá 1. juli 2020
- Roknskaparreglurgerð fyri Dátueftirlitið, góðkend av Løgmansskrivstovuni 15. mai 2022

## 2.4 Uppgávur

Sambært § 68 í dátuverndarlógini skal Dátueftirlitið m.a.:

- Av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónupplýsingum bert fer fram í samsvari við løgtingslógina og tær reglur, sum eru ásettar sbrt. løgtingslógini
- Styrkja almenna kunnleikan til dátuvernd
- Ráðgeva Føroya landsstýri og øðrum stovnum o.ø. um lóggávu og umsitingarlig tiltøk dátuvernd til frama
- Styrkja kunnleikan hjá dátuábyrgdarum og dátuviðgerum um teirra skyldur sbrt. hesi løgtingslóg
- Gera kanningar har persónupplýsingar verða viðgjørdar
- Fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónupplýsingum her á landi og uttanlands
- Gera eina ársfrágreiðing, sum skal almannakunngerast

Á hesum sæst, at stórur partur av uppgávunum hjá Dátueftirlitinum er at økja um kunnleikan til dátuverndarreglurnar. Tað er sostatt avgerandi fyri, at tey, sum eru fevnd av ásetingunum í dátuverndarlógini – sum dátuábyrgdarar, dátuviðgerar, skrásett o.a. – skilja ella í øllum førum hava neyðugu amboðini at skilja, hvat skyldurnar og rættindini í dátuverndarlógini merkja. Hetta sæst aftur í virkseminum hjá Dátueftirlitinum.

Sambært § 9 í løgtingslóg nr. 178 frá 17. desember 2020 um yvirvøku við vakmyndatóli, hevur Dátueftirlitið eftirlit við viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram sambært § 8 í somu lóg. Harumframt er ásett í § 9, at Dátueftirlitið førir eina skrá yvir vakmyndatól.

Sambært § 66 í *anordning nr. 754 af 19. juni 2017 om ikrafttræden af lov om behandling af personoplysninger for rigsmyndighedernes behandling af oplysninger på Færøerne* samstarva við danska dátueftirlitið, Dómstólastýrið og Dátueftirlitið og deila viðkomandi upplýsingar millum sín.

Sambært § 66a kann løgmálaráðharrin, eftir samráðing við landsstýrið, danska dátueftirlitið og Dátueftirlitið, leggja heimildir hjá danska dátueftirlitinum til Dátueftirlitið. § 66a hevur higartil ikki verið nýtt.

## 2.5 Heimildir

Í § 70 í dátuverndarlógini eru inntrívandi heimildirnar hjá Dátueftirlitinum lýstar. Sambært § 70 kann Dátueftirlitið:

- Geva dátuábyrgdara ella dátuviðgera ávaring um, at ætlað viðgerð sannlíkt er í ósamsvari við dátuverndarlógina
- Geva dátuábyrgdara ella dátuviðgera átalu, um viðgerð hevur verið í ósamsvari við dátuverndarlógina
- Krevja, at dátuábyrgdari ella dátuviðgeri steðgar viðgerð, og at viðkomandi rættar, strikar ella viðgerðaravmarkar ávísar upplýsingar, sum eru fevndar av tílíkari viðgerð
- Geva dátuábyrgdara ella dátuviðgera kravboð um at fáa viðgerð o.a. í samsvari við dátuverndarlógina innan eina nærri ásetta freist
- Geva dátuábyrgdara ella dátuviðgera kravboð um at fremja tøknilig og bygnaðarlig, herundir fysisk, trygdartiltøk, so at bert viðgerð fer fram, sum hevur heimild í dátuverndarlógini, so at persónupplýsingar ikki ólógliga forkomast, missast ella skerjast, og at tær ikki koma óviðkomandi til kunnleika ella verða misnýttar

Dátueftirlitið kann harumframt sambært § 71, stk. 1 krevja allar upplýsingar útflýggjaðar, sum eru av týdningi fyri virksemið hjá eftirlitinum. Við at vísa fram galdandi samleikaprógv hava ráðslimir og leiðandi starvsfólk á Dátueftirlitinum sambært § 71, stk. 2 til eina og hvørja tíð og uttan dómsúrskurð, við at vísa galdandi samleikaprógv, atgongd til øll høli, haðani persónupplýsingar verða viðgjørdar og til høli, haðani atgongd er til tær persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar. Dátueftirlitið hevur eisini atgongd til høli, har persónupplýsingar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

Brot á dátuverndarlógina kunnu verða revsað sbr. § 78. Sambært § 79 hevur Dátueftirlitið heimild at geva fyrisitingarlig sektaruppskot, tá ið nærri ásettar treytir eru loknar.

# 3. VIRKSEMI Í 2022

## UPPGÁVURNAR HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM ERU AT TRYGGJA PRIVATLÍV HINS EINSTAKA OG AT VIRKA FYRI, AT BÆÐI FYRITØKUR OG MYNDUGLEIKAR VIÐGERA PERSÓNUPPLÝSINGAR Á EIN SKYNSAMAN OG ÁBYRGDARFULLAN HÁTT.

Dátueftirlitið røkir hesar uppgávur við at veita vegleiðing og kunning og at hava eftirlit við, at dátuverndarlógin verður hildin. Eftirlit kunnu verða grundað á klagu ella fráboðan um trygdarbrot ella verða tikin upp av eintingum.

Harumframt er Dátueftirlitið eisini vanliga hoyringspartur, tá politiski myndugleikin smíðar ella broytir lógir og kunngerðir, ið onkursvegna hava við persónupplýsingar og viðgerð av persónupplýsingum at gera.

Nógv av virkseminum í 2021 snúði seg um kunning, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við, at nýggja lógin kom í gildi 1. januar 2021. Í 2022 valdi Dátueftirlitið at brúka meira orku upp á at fremja eftirlit. Leisturin við at senda út spurnarbløð varð nýttur í 2021, og tí bleiv valt at halda fram við tí.

Á dáturáðsfundi tann 20. apríl umrøddi Dáturáðið, hvussu eftirlitini skuldu skipast, tað ið eftir var av 2022. Avgjørt varð, at eins og í 2021 skuldi Dátueftirlitið gera eftirlit, ið vóru avmarkað til ávís evnir, og sum tóku støðið í spurnarblaði. Avgjørt varð eisini at økja munandi um talið av eftirlitum.

Upprunaliga var ætlanin at fremja eftirlit við dátuverndarfólkum, kunningini til tann skrásetta, handfaring av trygdarbrotum og dátuviðgerðaravtalum. Men av praktiskum ávum varð ætlanin broytt, og dátuviðgerðaravtalurnar vórðu tiknar úr.

Í 2022 varð eitt mál latið løgregluni. Talan var um dátuábyrgdara, ið hevði brotið eina røð av ásetingum í dátuverndarlógini. Dátueftirlitið mælti til eitt málskrav á 100.000 kr.

### 3.1 Eftirlit

Í 2022 hevur Dátueftirlitið skrásett 99 eftirlitismál. Býtt út á trý evnir: Handfaring av trygdarbrotum, dátuverndarfólk og kunning til tann skrásetta

### Handfaring av trygdarbrotum

Tann 5. mai 2022 sendi Dátueftirlitið eftirlitisskriv og spurninarskjal til 5 almennar myndugleikar, 12 fyritøkur og tvær kommunur. Spurt varð millum annað, hvussu nógv trygdarbrot vóru skrásett seinastu trý árini, og hvussu hesi trygdarbrot eru handfarin. Hartil varð eisini spurt um mannagongdir og kunning til starvsfólk í hesum høpi.

Tað var eitt sindur misjavnt, hvussu dátuábyrgdarar vóru fyri. Summir høvdu sett tiltøk í verk fyri at tryggja sær, at man uppdagaði, skrásetti og fráboðaði trygdarbrot, í meðan aðrir als ikki vóru byrjaðir upp á arbeiðið. Hesir dátuábyrgdarar fingu kravboð um at seta tey neyðugu tiltøkini í verk.

Tann 19. des. 2022 sendi Dátueftirlitið seinna umgangin av eftirlitisskrivum út. Tríggjar kommunur og 12 fyritøkur fingu sendandi eitt spurnarskjal at svara. Hóast nakað av samskifti varð aftur og fram, so vóru svarini í heila tikið nøktandi.

Samanumtikið boðaðu 13 fyritøkur og stovnar frá, at tey til samans høvdu skrásett 29 trygdarbrot seinastu trý árini. Havandi í huga hvussu lág gáttin er fyri, at ein hending skal roknast sum eitt trygdarbrot, metir Dátueftirlitið, at svarini bera brá av, at dátuábyrgdarar hava tørv á at skipa fyri fleiri innanhýsis tilviskutiltøkum ella, at dátuábyrgdarar ikki í nóg stóran mun hava gjørt sær greitt, júst hvat er umfatað av hugtakinum “trygdarbrot”.

### Kunning til tann skrásetta

Síðst í mai í 2022 sendi Dátueftirlitið spurnarskjal til politisku flokkarnar, ið tá høvdu umboðan í Løgtinginum. Spurt var um ymiskt, ið hevði við rættindini hjá tí skrásetta at gera við høvuðsdenti á kunningarskylduna hjá dátuábyrgdarum.

Málini vóru ikki liðugt viðgjørd, tá val til Fólkatingið varð útskrivað tann 5. oktober til at verða hildið tann 31. oktober, og fyri at ein møgulig niðurstøða ikki skuldi kunna ávirka valið, valdi Dátueftirlitið at steðga við viðgerðini av málunum til eftir fólkatingsvalið. Men longu tann 9. november skrivaði táverandi løgmaður út løgtingsval til at verða hildið tann 8. desember. Málini vórðu tískil ikki liðugt viðgjørd fyrrenn í 2023.

Yvirskipaða niðurstøðan var, at dátuvernd ikki var eitt raðfest øki hjá politisku flokkunum. Tveir flokkar fingu átalu fyri ikki at svara spurnarskjalinum hóast fleiri áminningar frá Dátueftirlitinum og hóast, at flokkarnir fleiri ferðir høvdu lovað at senda svar sum skjótast. Tveir aðrir flokkar fingu átalu fyri at hava sent Dátueftirlitinum ófullfíggjað svar. Allir sjey flokkarnir fingu kravboð um at fáa eina røð av viðurskiftum í rætt lag.

Sama spurnarskjal varð eisini sent til ein almennan myndugleika og 22 sálafrøðingar. Í seks førum gav Dátueftirlitið kravboð, og í einum føri gav Dátueftirlitið eisini eina átalu. Eitt mál varð lokað uttan niðurstøðu, tí viðkomandi sálarfrøðingur var givin við virkseminum. Í

hinum 15 málunum metti Dátueftirlitið, at viðurskiftini, ið spurt varð um, vóru nøktandi.

## Dátuverndarfólk

Sambært § 53, stk. 1 skulu allir almennir myndugleikar og ávísir privatir dátuábyrgdarar/dátu- viðgerðar tilnevna eitt dátuverndarfólk. Í 2022 hevur Dátueftirlitið havt eftirlit við dátuverndarfólkinum hjá tíggju almennum stovnum.

Dátuverndarlógin ásetir nakrar karmar fyri starvið hjá dátuverndarfólkinum, ið millum annað skal tryggja óheftni hjá viðkomandi og at tryggja, at dátuverndarfólkið hevur stundir at taka sær av uppgávunum, og at nokk av peningi er sett av til at røkja uppgávurnar. Lógin ásetir eisini, hvørjar uppgávur dátuverndarfólkið í minsta lagi skal hava.

Dátuverndarfólkið skal kunna og ráðgeva dátuábyrgdaran, dátuviðgeran og starvsfólk, sum viðgera persónupplýsingar, um teirra skyldur sbrt. dátuverndarlógini. Dátuverndarfólkið skal halda eyga við, at dátuverndarlógin og aðrar reglur um dátuvernd verða hildnar og ráðgeva um avleiðingargreining, tá biðið verður um tað. Dátuverndarfólkið skal eisini samstarva við Dátueftirlitið og virka sum samskiftisstað hjá Dátueftirlitinum í spurningum um viðgerð av persónupplýsingum. Dátuverndarfólkið kann hava aðrar uppgávur og skyldur, men dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin skal tryggja, at slíkar uppgávur og skyldur ikki hava við sær áhugamálsstríð.

Í tveimum av eftirlitunum metti Dátueftirlitið, at ov lítið av tíð var sett av til at røkja uppgávuna, sum dátuverndarfólk og heitti á stovnarnar/myndugleikarnar um at endurskoða, um nøktandi tíð var sett av til uppgávuna. Hvussu nógva tíð dátuverndarfólkið skal brúka til at røkja uppgávuna er ein meting, sum dátuábyrgdarin skal gera í mun til ítøkiliga tørvin hjá stovninum.
Í einum máli endaði eftirlitið við, at Dátueftirlitið gav stovninum kravboð um at tilnevna annað dátuverndarfólk, tí stjórin var tilnevndur dátuverndarfólk. Sambært dátuverndarlógini kann dátuverndarfólkið loysa aðrar uppgávur og skyldur fyri stovnin. Stovnurin skal tó tryggja, at aðrar uppgávur og skyldur ikki hava við sær áhugamálsstríð, sum gera at dátuverndarfólkið ikki fær røkt uppgávurnar til fulnar ella í fullum óheftni. Hetta viðførir, at dátuverndarfólkið ikki samstundis kann hava evstu ábyrgdina av, at viðgerðin fer lógliga fram. Uppgávurnar hjá einum stjóra eru millum annað at hava evstu ábyrgd av, at dátuverndarlógin verður hildin, og at viðgerð av persónupplýsingum fer fram í samsvari við dátuverndarlógina. Tá stjórin er tann, sum hevur evstu ábyrgd á stovninum, kann stjórin ikki verða dátuverndarfólk. Eisini er ásett í dátuverndarlógini, at samskiftisupplýsingarnar hjá dátuverndarfólkinum skulu almannakunngerast. Stovnurin hevði ikki almannakunngjørt samskiftisupplýsingarnar hjá dátuverndarfólkinum og fekk tí kravboð um at gera tað.

Í 5 av eftirlitunum kom fram, at dátuverndarfólkið hevði aðrar KT-uppgávur, umfamt leiklutin sum dátuverndarfólk. Í fýra førum staðfesti/metti Dátueftirlitið, at talan ikki var um áhugamálsstríð í leiklutinum sum dátuverndarfólk, samstundis sum viðkomandi eisini røkti ávísar KT-uppgávur, og endaðu tí eftirlitsmálini. Í einum máli gav Dátueftirlitið dátuábyrgdaranum kravboð um at tilnevna annað dátuverndarfólk. Dátueftirlitið metti, at talan er um áhugamálsstríð, tá sami persónur bæði hevur útinnandi leiklut (KT-trygdarleiðari) og eftiransandi leiklut (dátuverndarfólk) hvat dátuverndini viðvíkur.

## 3.2 Trygdarbrot

Sambært § 47 í dátuverndarlógini skulu brot á persóndátutrygdina í útgangsstøðinum fráboðast Dátueftirlitinum.

Eitt trygdarbrot er eitt brot á trygdina, sum førir við sær, at persónupplýsingar av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar, broyttar, óheimilað givnar víðari, ella at atgongd verður givin til persónupplýsingar, sum eru sendar, goymdar ella á annan hátt viðgjørdar.

### Trygdarbrot






At trygdarbrot skulu fráboðast Dátueftirlitinum, gevur m.a. eftirlitinum møguleika at fylgja við í hvat fer fram, og um tað eru trygdarbrot, sum ganga aftur, og sum økt fokus eigur at setast á.

Dátueftirlitið hevur í 2022 viðgjørt 37 mál um trygdarbrot, ið er ein munandi øking í mun til 2021, tá 18 mál um trygdarbrot vórðu fráboðað. Í øllum 37 førunum var tað dátuábyrgdarin, ið boðaði frá.

Í 18 málum metti Dátueftirlitið, at fráboðanin var nøktandi og gjørdi ikki meira við málið. Í átta førum gav Dátueftirlitið kravboð, og í trimum førum gav Dátueftirlitið átalu. Dátueftirlitið gevur vanliga átalu, tá mett verður, at trygdarbrotið – í hvussu so er partvís – hendi vegna ósketni frá dátuábyrdarans síðu. Er hinvegin talan um ein ábyrgdara, ið hevur tikið øll neyðug stig fyri at halda dátuverndarlógina, men kortini fær eitt trygdarbrot, so ger Dátueftirlitið vanliga ikki meir við málið. Er talan um smærri manglar, metir Dátueftirlitið tað vanliga vera nøktandi við bert at geva kravboð.

Tvær av átalunum, ið Dátueftirlitið gav, vóru álvarsligar átalur. Slíkar átalur verða fyrst og fremst givnar, tá kanningin hjá Dátueftirlitinum vísir á átaluverd viðurskifti viðvíkjandi grundleggjandi tættum í dátuverndarlógini, eitt nú at dátuábyrgdarin onga mannagongd hevur fyri handfaring av trygdarbrotum, ella tá ið trygdarbrotið er hent vegna grovt ósketni frá dátuábyrgdarans síðu.

Í einum málið hevði ein dátuábyrgdari boðað frá einum trygdarbroti. Undir viðgerðini av málinum bað Dátueftirlitið um avrit av mannagongdini fyri handfaring av trygdarbrotinum. Dátueftirlitið staðfesti, at mannagongdin var als ikki nøktandi, og kundi beinleiðis verða viðvirkandi til, at starvsfólkini hjá dátuábyrgdaranum ikki vistu, nær tey skuldu boða frá. Tí valdi Dátueftirlitið – hóast trygdarbrotið í sær sjálvum ikki var álvarsligt – at geva dátuábyrgdaranum eina álvarsliga átalu.

Eins og í 2021 var mest vanliga trygdarbroti, at teldupostar o.a. varð sent skeivt.

## 3.3 Ráðgeving og vegleiðing

Í § 68 í dátuverndarlógini og í viðmerkingunum til hana er stórur dentur lagdur á, at Dátueftirlitið skal leggja dent á vegleiðandi arbeiði og almenna og ítøkiliga kunning um dátuverndarøkið. Hetta bleiv eisini tikið fram undir viðgerðini í Løgtinginum, sum er sera týdningarmikið fyri at stuðla undir broytingina í rættarstøðuni.

Eins og í 2021 hevur Dátueftirlitið brúkt nógva orku upp á at kunna og vegleiða um dátuverndarlógina, og í ein ávísan mun eisini vakmyndatólslógina. Hetta hevur verið gjørt við at halda fundir og kunnandi tiltøk/skeiðir. Millum annað hevði stjórin í Dátueftirlitinum eina framløgu um dátuverndarlógina á árliga kundadegnum hjá stórari føroyskari KT-fyritøku.

## 3.4 Hoyringar

Sambært § 74 í dátuverndarlógini skulu uppskot til løgtingslógir, kunngerðir, rundskriv o.tíl., sum hava ásetingar um viðgerð av persónupplýsingum, sendast til ummælis hjá Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið fær ofta lógaruppskot, kunngerðaruppskot o.a. til ummælis. Í hvørjum einstøkum føri metir Dátueftirlitið um, hvørt uppskotið er í samsvari við lóggávuna, sum Dátueftirlitið umsitur ella um broytingar eiga at verða gjørdar í uppskotinum.

Í 2022 fekk Dátueftirlitið hesi uppskot til hoyringar:

- Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om retshåndhævende myndigheders behandling af personoplysninger
- Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af visse bestemmelser i forskellige love om ændring af lov om finansiel virksomhed
- Uppskot til ríkislógartilmæli um dagføring av konkurslógini fyri Føroyar
- Uppskot til løgtingslóg um Fólkaheilsustýri
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. (Beinleiðis atgongd til elektroniskar upplýsingar í telduskipanum)
- Uppskot til kunngerðir um forskriftir, heilivágsbílegging og skamtan av heilivági
- Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðv. flutningi
- Uppskot til kunngerð um at seta í gildi § 4 í løgtingslóg um talgildan samleika

Umframt uppskotini, ið eru nevnd omanfyri, svaraði Dátueftirlitið einum fyrispurningi frá Løgmansskrivstovuni um § 786, stk. 3 litra í donsku rættargangslógini í sambandi við arbeiðinum at endurskoða rættargangslógina fyri Føroyar.

## 3.5 Fráboðanir um vakmyndatól

Sambært § 66, stk. 2 í dátuverndarlógini hevur Dátueftirlitið eftirlit við allari viðgerð av persónupplýsingum, sum dátuverndarlógin fevnir um.

§ 9, stk. 1 í løgtingslóg nr. 178 frá 17. desember 2020 um yvirvøku við vakmyndatóli hevur við sær, at eftirlitsøkið hjá Dátueftirlitinum verður víðkað til at fevna um viðgerð av persónupplýsingum sambært § 8 í løgtingslógini um vakmyndatól. Umframt at hava eftirlit við, um § 8 verður hildin, skal Dátueftirlitið, sum nevnt eftir § 66, stk. 2 í dátuverndarlógini, hava eftirlit við allari viðgerð av persónupplýsingum, sum dátuverndarlógin fevnir um.

Hetta merkir, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við um myndugleikar, fyritøkur o.o. viðgera persónupplýsingar í samsvari við dátuverndarlógina. Tá ið ein myndugleiki, fyritøka o.o. yvirvaka við vakmyndatóli, skal tann viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram, sostatt vera innan fyri teir karmar og uppfylla tær reglur, sum dátuverndarlógin setur.

§ 9, stk. 1 í vakmyndatólslógini hevur ikki við sær, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við, at løgtingslógin um vakmyndatól sum heild verður hildin. Dátueftirlitið skal m.a. ikki geva loyvi til yvirvøku við vakmyndatóli og skal í útgangsstøðinum ikki taka støðu til, um yvirvøka er heimilað. Dátueftirlitið kann vegleiða um dátuvernd í sambandi við yvirvøku, men eftirlitið við, um løgtingslóg um vakmyndatól verður hildin, liggur hjá politinum.

Sambært § 9, stk. 2 í løgtingslógini um vakmyndatól, skal Dátueftirlitið føra eina skrá yvir vakmyndatól.

Sambært viðmerkingunum til løgtingslógina er orsøkin til ásetingina í § 9, stk. 2 fyri tað fyrsta at halda eyga við gongdini á yvirvøkuøkinum og at tryggja vanligt skilhald á økinum. Yvirvøka við vakmyndatóli kann vera eitt inntriv í frælsið hjá tí einstaka, og tí er neyðugt at halda eyga við gongdini á økinum, eins og ein fráboðanarskylda kann hava við sær avmarking í nýtslu. Fyri tað næsta skal ein skrá tryggja, at tað er møguligt hjá politinum skjótt at kanna, um vakmyndatól eru í einum øki, sum er viðkomandi fyri kanning av einum ítøkiligum máli.

Talan er um eina fráboðanarskipan og ikki um eina loyvisskipan. Dátueftirlitið skal tí ikki geva loyvi til uppseting av vakmyndatólum, men kann tó vegleiða um løgtingslógina og dáturættarligu avbjóðingarnar við yvirvøku o.s.fr. Um eitt fráboðað vakmyndatól greitt er í ósamsvari við løgtingslógina, skal Dátueftirlitið sjálvandi eisini gera vart við hetta.

Við ársbyrjan 2021 gjørdi Dátueftirlitið saman við Føroya Politi og Løgmansskrivstovuni eina vegleiðing um nýggju lógina. Dátueftirlitið kunnaði samstundis alment um fráboðanarskylduna.

Dátueftirlitið fekk í 2022 24 fráboðanir um vakmyndatól. Fráboðanirnar fevna um umleið 307 tól.

# 4. YMISK HAGTØL FYRI 2022

## UPPLÝSINGARNAR Í HESUM PARTINUM AV ÁRSFRÁGREIÐINGINI ERU GRUNDAÐAR Á SKRÁSETINGINA AV NÝGGJUM MÁLUM Í JOURNALSKIPANINI HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM FYRI 2022 OG VIÐVÍKJA SOSTATT BARA NÝGGJUM MÁLUM.

Ein stórur partur av málunum hjá Dátueftirlitinum er ofta framhald av gomlum málum, t.d. broytingar í givnum loyvum ella fráboðanum. Hesi mál eru ikki tikin við í hetta yvirlitið, sum bara snýr seg um mál, sum eru stovnað í 2022. Ikki øll mál, ið eru við í hagtølunum vóru lokaði við ársenda.

### Trygdarbrot




### Bólking av málum í 2018-2022



## Bólking av málum í 2018-2022




## Málsbýti í prosentum í mun til myndugleikar, fyritøkur o.o.



## Málsbýti í mun til evnisbólkar




## Munnligir fyrispurningar

Í hesum bólki eru bara skrásettir fyrispurningar, har borgarar ella myndugleikar fáa beinleiðis vegleiðing umvegis telefon, og tað ikki snýr seg um samskifti í sambandi við verandi ella komandi mál.

Í 2022 vóru 141 munnligir fyrispurningar skrásettir. Á myndini niðanfyri sæst, hvussu teir munnligu fyrispurningarnir, sum vóru avgreiddir í 2022, kunnu bólkast.

## Málsbýti í mun til myndugleikar, fyritøkur, privatpersónar og kommunur



# 5. ÚTVALD MÁL Í 2021

## 5.1 Almennur stovnur fingið álvarsliga átalu

28. apríl 2022 fekk Dátueftirlitið fráboðan um trygdarbrot frá einum almennum stovni.

Stovnurin hevði sent eitt brævv til skeivan persón. Brævið innihelt viðkvæmar persónupplýsingar. Tann skeivi móttakarin etur stovninum brævið aftur tann 23. apríl. Stovnurin staðfestir 27. apríl, at eitt trygdarbrot er farið fram.

Í viðgerðini av trygdarbrotinum hevur Dátueftirlitið kannað, um stovnurin hevur nøktandi skrivligar mannagongdir til starvsfólkini, so tey vita, hvat tey skulu gera, tá eitt trygdarbrot fer fram.

Dátueftirlitið kom til ta niðurstøðu, at mannagongdin til starvsfólkini var als ikki nøktandi, og at hon ístaðin kundi elva til misskiljingar fyri starvsfólkini, so tey ikki skilja, hvat eitt trygdarbrot er, og ikki skilja álvaran av, at øll trygdarbrot, óansæð hvussu umfatandi tey eru, skulu skjalfestast.

Um greiðar skrivligar mannagongdir vóru til starvsfólkini, so átti trygdarbrotið at verið staðfest tann 23. apríl, tá stovnurin fekk brævið innaftur.

Dátueftirlitið metti tað vera sera álvarsamt, at ein stovnur, sum viðgerð nógvar viðkvæmar persónupplýsingar, ikki hevur nøktandi mannagongdir fyri trygdarbrot. Dátueftirlitið gav stovninum eina álvarsliga átalu og kravboð um at tillaga skrivligu mannagongdirnar til starvsfólkini, soleiðis at tær greitt lýsa hvat eitt trygdarbrot er, og hvat starvsfólkini skulu gera, tá eitt trygdarbrot verður staðfest.

## 5.2 Óviðkomandi fingið atgongd til viðkvæmar upplýsingar

Í mai 2022 fekk Dátueftirlitið fráboðan um trygdarbrot í sambandi við innbrot á stovni, sum viðger nógvar viðkvæmar persónupplýsingar. Viðkvæmar persónupplýsingar er ein bólkur av persónupplýsingum, sum er serliga væl vardur eftir lógini. Lutfalsliga strangari trygdarfyriskipanir skulu forða fyri, at óviðkomandi fáa kunnleika til tær.

Stovnurin selur vørur, sum hava navnaseðil við viðkvæmum persónupplýsingum. Í sambandi við innbrotið vórðu vørur við viðkvæmum upplýsingum tiknar. Talan var um vørur, ið vóru settar til síðis, tí tær skuldu burturbeinast. Stovnurin hevði ikki yvirlit yvir vørurnar, ið skuldu burturbeinast, og visti tí ikki, hvat var tikið. Tískil visti stovnurin heldur ikki, hvør átti stolnu persónupplýsingarnar og kundi ikki boða eigarunum frá um trygdarbrotið. Í hesum førinum hevði tað stóran týdning at boða eigarunum frá, tí brotið kundi hava álvarsamar persónligar avleiðingar fyri tey, ið áttu upplýsingarnar.

Dátueftirlitið metir, at tað als ikki er nøktandi, at stovnurin ikki við vissu kundi siga, hvørjar vørur vóru stolnar, og tískil heldur ikki kundi seta seg í samband við tey, ið vóru rakt. Dátueftirlitið hevur tískil givið stovninum eina álvarsliga átalu og kravboð um seta í verk nøktandi mannagongdir fyri at tryggja, at slíkt trygdarbrot ikki kann koma fyri aftur.

## 5.3 Fyritøka meldað til løgregluna fyri brot á dátuverndarlógina

Í august í 2022 gjørdist Dátueftirlitið varugt við, at ein fyritøka savnaði og goymdi persónupplýsingar uttan neyðuga heimild og uttan at veita teimum skrásettu nøktandi kunning.

Fyritøkan bjóðaði veitarum at lýsa umvegis heimasíðuna hjá fyritøkuni. Tey skrásettu kundu so seta seg í samband við hesar veitarar gjøgnum heimasíðuna hjá fyritøkuni. Men tá hetta varð gjørt, var skipanin hjá fyritøkuni sett at savna inn og goyma upplýsingar um tey skrásettu. Talan var um upplýsingar, ið annars bert vóru ætlaðar viðkomandi veitara. Hetta varð gjørt, uttan at fyritøkan hevði fingið samtykki frá teimum skrásettu, og uttan at fyritøkan á nøktandi hátt kunnaði tey skrásettu um hvat fór fram.

Undir viðgerðini av málinum gjørdist greitt, at fyritøkan hevði tvær ymiskar skipanir til sama endamál, og at báðar skipanir vóru stillaðar at goyma persónupplýsingar, ið bert vóru ætlaðar til tann veitara, ið tann skrásetti setti seg í samband við. Dátueftirlitið metti, at í einum tíðarskeiði á umleið hálvan annan mánað hevði onnur skipanin í 16 førum ólógliga savnað inn persónupplýsingar.

Fyritøkan sjálv metti seg hava fingið samtykki, tí at tey skrásettu sjálv høvdu tøppað upplýsingarnar inn í skipanina. Fyritøkan metti seg eisini hava givið teimum skrásettu kunning, tí í skipanini stóð ein stuttur tekstur um, at eitt avrit av boðunum varð sent til fyritøkuna. Men sambært dátuverndarlógini eru ávísar treytir til eitt samtykki og til kunningina til tann skrásetta. Í hvørgum av førunum livdi fyritøkan upp til treytirnar í løgtingslógini.

Fyritøkan hevði heldur ikki gjørt yvirlit yvir viðgerðir, soleiðis sum álagt er í § 44, stk. 1.

Samanumtikið metti Dátueftirlitið, at fyritøkan hevði brotið § 7, stk. 1, § 8, stk. 1, §§ 21 og 23 og § 44 í dátuverndarlógini. Dátueftirlitið hevur tí heitt á løgregluna

um at skuldseta fyritøkuna fyri brot á hesar ásetingar og mælt til, at málskravið verður ein sekt upp á 100.000 kr.

### 5.4 Almennur stovnur álvarsliga átalu fyri væntandi trygd

Í september 2022 fekk Dátueftirlitið eina fráboðan um trygdarbrot hjá einum almennum stovni. Í sambandi við dagføring av eini KT-skipan hjá stovninum var privata fyritøkan, ið stovnurin nýtti sum KT-veitara hjá stovninum, vorðin varug við, at feilur var í atgongdarstýringini í KT-skipanini. Skipanin varð upprunaliga tikin í nýtslu í 2019. Í september í 2022 gjørdi KT-veitarin viðlíkahaldsuppgávur í KT-skipanini, og leggur tá til merkis, at atgongdarstýringin er skeivt stillað.

Skeiva stillingin hevði við sær, at allir brúkarar hjá tíggjutals øðrum almennum stovnum høvdu havt atgongd til upplýsingarnar í skipanini líka síðani 2019. Sera nógv óviðkomandi høvdu tískil havt atgongd til skipanina í umleið trý ár.

Stovnurin greiddi tó frá, at so skjótt man varnaðist feilin varð skipanin tikin niður, og atgongdarstýringin rættað. Ein gjøgnumgongd av loggunum í skipanini vísti, at hóast atgongd hevði verið til bæði vanligar og viðkvæmar persónupplýsingar, so hevði eingin óviðkomandi verið inni á skipanini.

Dátueftirlitið kom til ta niðurstøðu, at stovnurin hevði brotið § 7, stk. 1 nr. 6 í dátuverndarlógini, tí stovnurin ikki hevði viðgjørt persónupplýsingarnar á ein hátt, sum tryggjar nøktandi trygd av persónupplýsingum, undir hesum vernd ímóti óheimilaðari ella ólógligari viðgerð. Stovnurin hevði ikki hildið § 37, ið áleggur dátuábyrgdaranum at seta í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig trygdartiltøk, og hevði heldur ikki hildið § 38, stk. 2 um standardinnstillingar, tí at atgongdarstýringin var ikki stillað rætt.

Av tí, at talan var um eina KT-skipan við persónupplýsingum um allar borgarar í Føroyum, harav ein partur er viðkvæmir upplýsingar, og tí at sera nógv óviðkomandi høvdu havt atgongd í eitt langt tíðarskeið, metti Dátueftirlitið, at talan var um eitt sera álvarsligt trygdarbrot og gav tí stovninum eina álvarsliga átalu, og kravboð um at gjøgnumganga allar sínar KT-skipanir fyri at tryggja, at hesar vóru settar rætt upp hvat atgongdarstýring viðvíkur.

### 5.5 Viðkvæmar persónupplýsingar lagdar út á Facebook

Í november 2022 fekk Dátueftirlitið eina fráboðan um eitt trygdarbrot hjá einum almennum stovni. Stovnurin greiddi frá, at eitt starvsfólk hjá stovninum av misgáum hevði lagt upplýsingar um ein borgara út á sín privata Facebook vanga. Talan var um eina fundarfrásøgn frá einum fundi við viðkomandi borgara. Fundarfrásøgnin hevði ymsar viðkvæmar upplýsingar um borgaran.

Greitt var frá, at viðkomandi starvsfólk hevði ætlað at senda sær sjálvum skjalið umvegis Facebook Messenger, men hevði av óvart lagt skjalið út á vangan ístaðin.

Stovnurin greiddi Dátueftirlitinum frá, at hóast starvsfólk kunnu brúka sosialar miðlar í sínum arbeiði, so skulu tey ikki brúka sosialar miðlar, tá persónupplýsingar verða viðgjørdar. Undir viðgerðini av málinum bað Dátueftirlitið um at fáa avrit av mannagongdunum, ið stovnurin hevði viðvíkjandi viðgerð av persónupplýsingum. Stovnurin hevði gjørt sær slíkar mannagongdir, men tær umfataðu ikki sosialar miðlar, og í hvønn mun sosialir miðlar kunnu brúkast í arbeiðinum.

Um stovnurin velur at brúka sosialar miðlar í sínum virksemi, so eigur stovnurin sum dátuábyrgdari at taka serlig atlit at tryggja bygnaðarlig tiltøk og taka brúk av sosialum miðlum við í sínum vegleiðingum. Hetta hevði stovnurin ikki gjørt.

Dátueftirlitið legði dent á, at meginreglurnar sbrt. § 7, stk. 1, nr. 6 í dátuverndarlógini, ið áleggja stovninum at tryggja persónupplýsingar ímóti óheimilari atgongd, ikki eru hildnar. Stovnurin hevur ikki hildið ásetingarnar í § 37 um nøktandi trygdartiltøk, ið tryggja, at lógin er hildin.

Dátueftirlitið kom til ta niðurstøðu, at trygdarbrotið er sera álvarsamt og átaluvert. Dátueftirlitið gav stovninum kravboð um at tryggja, at trygdartiltøkini eisini umfata nýtslu av sosialum miðlum. Stovnurin skal orða sínar vegleiðingar soleiðis, at starvsfólk greitt vita, hvussu tey skulu fara fram, tá tey í sínum arbeiði virka á sosialum miðlum.

### 5.6 Kommuna fingið átalu og kravboð

Í oktober 2022 gav Dátueftirlitið eini kommunu átalu fyri viðgerðina av persónupplýsingum í eini GPS-skipan. Dátueftirlitið gav eisini kommununi kravboð um at fáa eina røð av viðurskiftum í rætt lag.

Fleiri fyritøkur og stovnar hava GPS-skipan í teirra akførum. Ein GPS-skipan kann millum annað skráseta leið og ferð á akfari. Tá tað ber til at knýta skrásetingina til bilføraran, er skrásetingin at meta sum persónupplýsing.

Sambært dátuverndarlógini skal dátuábyrgdari seta í verk hóskandi tiltøk fyri at tryggja, at viðgerð er í samsvari við lógina. Dátueftirlitið ger javnan eftirlit, og í hesum føri er talan um eftirlit av GPS-skipanum í akførum hjá einari kommunu.

Kommunan fekk átalu fyri ikki at vera vitandi um, at talan er um dátuviðgerð og fyri ikki at hava dátuviðgerðaravtalu við veitararnar av GPS-skipanunum. Dátueftirlitið metti, at í fleiri førum var neyðugt við broytingum, og gav kommununi kravboð um at gera nøktandi manna-

gongdir fyri umsiting av GPS-skipanunum, og at geva starvsfólkunum skrivliga kunning um viðgerðina av persónupplýsingum, sum fer fram í GPS-skipanunum.

### 5.7 Dátuverndarkunning eigur at vera á føroyskum

Á dáturáðsfundi tann 1. november viðgjørdi Dáturáðið eitt eftirlit við einum dátuábyrgdara. Sum liður í eftirlitinum hevði Dátueftirlitið fingið viðkomandi mannagongdir og kunning frá dátaábyrgdara. Stórur partur av tilfarinum var á enskum, hóast málbólkurin var føroyingar.

Dáturáðið kom til ta niðurstøðu, at viðkomandi dátuábyrgdari skal veita føroysku starvsfólkum sínum skrivliga kunning á føroyskum.

Sambært § 21 skal dátuábyrgdarin tryggja, at allar upplýsingar um viðgerð av persónupplýsingum, sum verða latnar skrásetta eftir løgtingslógini, verða latnar á ein stuttorðaðan, gjøgnumskygdan, lætt skilligan og lætt atkomiligan hátt.

Dáturáðið staðfesti, at orðingin í § 21, stk. 1 skal tulkast soleiðis, at "...gjøgnumskygdan, lætt skilligan og lætt atkomiligan hátt" merkir, at kunningin sum meginregla skal vera á føroyskum.

Dátueftirlitið fer framyvir at átala kunning, ið ikki er á føroyskum, og geva kravboð um at broyta kunning á øðrum máli til føroyskt. Dátueftirlitið kann í serstøkum førum loyva, at kunningin verður givin á øðrum máli enn føroyskum.

### 5.8 Dátuviðgerðar kunnu ikki vera dátuverndarfólk – nágreining

Á dáturáðsfundi tann 8. juli í 2021, kom Dáturáðið til ta niðurstøðu, at tað var í stríð við § 55, stk. 4, at starvsfólk hjá einum dátuviðgera, sum veitir KT-skipanir, sum viðgera persónupplýsingar, ikki samstundis kunnu vera dátuverndarfólk hjá dátuábyrgdaranum.

Grundgevingin var m.a., at dátuverndarfólkið kann koma í ta støðu at skula boða dátuábyrgdaranum frá, at viðgerðin av persónupplýsingum í skipanini ikki er í samsvari við lógina, og at broytingar eiga at verða gjørdar, ella at KT-útgerðin eigur at verða skift. Dátuverndarfólkið kann eisini koma í ta støðu, at viðkomandi skal ráðgeva um at skifta veitara, tí núverandi veitari ikki livir upp til krøvini í dátuverndarlógini. Hetta kann seta dátuverndarfólkið í eina óhepna støðu, tá viðkomandi starvast hjá veitaranum.

Avgerðin hevur verið tulkað á tann hátt, at dentur hevur verið lagdur á formligu viðurskiftini hjá dátuviðgeranum. Tað vil siga, at um dátuverndarfólkið er í starvi hjá dátuviðgeranum, er talan um áhugamálsstríð sbrt. § 55, stk. 4, men um viðkomandi starvaðist í einum dótturfelagi, sum dátuviðgerin eigur, so er hinvegin ikki talan um áhugamálsstríð.

Á dáturáðsfundi tann 1. november 2022 hevur Dáturáðið nágreinað upprunaligu avgerðina: Tá mett verður, um eitt dátuverndarfólk lýkur kravið í § 55, stk. 4 um áhugamálsstríð, skal dentur leggjast á veruligu viðurskiftini heldur enn bert tey formligu. Tað vil siga, at um ein dátuviðgeri eitt nú hevur broytt bygnaðin, og lagt dátuverndarfólkið í eitt dótturfelag, men viðkomandi í roynd og veru framvegis starvast hjá dátuviðgeranum, so er talan um áhugamálsstríð § 55, stk. 4.

Niðurstøðan hevur m.a. við sær, at starvsfólk hjá einum veitara, sum virka sum dátuverndarfólk, í útgangsstøðinum ikki kunnu flytast til eitt dótturfelag og síðani halda fram við at virka sum dátuverndarfólk fyri kundar hjá móðurfelagnum. Nær talan er um veruligt óheftni, er ein ítøkilig meting hjá Dátueftirlitinum. Metir Dátueftirlitið ikki, at talan er um veruligt óheftni, kann Dátueftirlitið geva kravboð um, at viðkomandi dátuábyrgdari ella dátuviðgeri velur annað dátuverndarfólk.

# 6. ALTJÓÐA SAMSTARV

## TAÐ, SUM EYÐKENNIR LONDINI RUNDANUM OKKUM, TÁ TALAN ER UM VERND AV PERSÓNUPPLÝSINGUM, ER EITT VÍTTFEVNANDI ALTJÓÐA SAMSTARV

Hetta samstarv hevur stóran týdning og er neyðugt orsakað av, at persónupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk. Tá ið tað er møguligt, luttekur Dátueftirlitið í hesum samstarvi.

### 6.1. Triðjalandsgóðkenning frá ES-nevndini

Innlendismálaráðið søkti í 2005 ES-nevndina um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland í persónupplýsingarhøpi. Í 2010 komu boðini um, at ES-nevndin hevur góðkent Føroyar sum eitt trygt triðjaland.

Dátueftirlitið fegnast um ES góðkenningina, sum í høvuðsheitum merkir, at ES metir trygdarstøðið í Føroyum vera á jøvnum føti við trygdarstøðið í ES-londum, tá tað snýr seg um viðgerð av persónupplýsingum. Hetta merkir samstundis, at ES viðurkennir Føroyar sum eitt land, sum verjir grundleggjandi demokratisk rættindi í einum nútímans talgildum samfelagi.

Triðjalands góðkenningin hevur við sær, at Føroyar komu á listan yvir trygg triðjalond og hevur havt týdning fyri føroyskar fyritøkur, herundir peningastovnar, sum samskifta nógv við útheimin.

Avgerðin um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland kom í gildi tann 15. juni 2010.

Í sambandi við, at ES-fyriskipanin General Data Protection Regulation (GDPR) kom í gildi í 2018 hevur ES-nevndin arbeitt við at endurskoða tær góðkenningar, sum eru givnar eftir reglunum, sum áður vóru galdandi. ES-nevndin hyggur í hesum sambandi eisini at føroysku góðkenningini. Arbeiðið við at endurskoða føroysku góðkenningina er ikki liðugt enn.

### 6.2 Triðjalandsgóðkenning av Suðurkorea

ES-nevndin tók tann 17. desember 2021 avgerð um, at Suðurkorea hevur eitt nøktandi verndarstøði, soleiðis at persónupplýsingar kunnu flytast úr ES til Suðurkorea, tó undantikið til átrúnaðarligar felagsskapir í tann mun, hesir viðgera persónupplýsingar sum liður í teirra trúboðaravirksemið; politiskar flokkar í tann mun teir viðgera persónupplýsingar í sambandi við tilnevning av valevnum og dátuábyrgdarar, ið eru undir eftirliti av “The Financial Services Comission” viðvíkjandi viðgerð av persónligum kreditupplýsingum, sambært “the Credit Information act”, í tann mun teir viðgera slíkar upplýsingar.

Í brævi til løgmann tann 4. februar mælti Dátueftirlitið til, at løgmaður ásetti, at Suðurkorea hevur eitt nøktandi verdnarstøði við somu avmarkingum, sum ES-nevndin ásetti.

Løgmaður tók undir við hesi áheitan, og tann 4. mai 2022 var kunngerð um broyting í kunngerð um triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðvíkjandi flutningi av persónupplýsingum, kunngjørd. Kunngerðin setti Suðurkorea á listan yvir triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðvíkjandi flutningi av persónupplýsingum.

### 6.3 Norðurlenskur fundur í Helsinki

Tann 13. og 14. oktober hittust norðurlendsku dátueftirlitini í Helsinki fyri at deila royndir og kjakast um viðkomandi evni.

Árligi norðurlendski fundurin hevur verið síðani 1988, men orsakað av korona hevur steðgur verið síðani 2019. Eins og á seinasta fundi í Stokkhólmi bleiv ein yvirlýsing samtykt. Helsinki yvirlýsingin leggur serligan dent á verju av dáta hjá børnum. Ætlanin er at stovna ein arbeiðsbólk, sum skal fáast við børn og spæl á netinum.

**Dátueftirlitið**

Heiðavegur 25 | 600 Saltangará | +298 309100